**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI**
**MATR. NR. 43g og MATR. NR. 43h Á ARGJABOÐA, ARGIR**
**SB_Argir_Argjaboði_2018_4_2025**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. HEIMILD OG AVMARKING

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa íbúðarbygging á økinum.

Stk. 2. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðhefta kortskjali 1, matr. nr. 43g og matr. nr. 43h á Argjaboða, Argir og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

Stk. 3. Økið er uml. 5600m$^2$ til støddar og liggur í einum C3 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til miðstaendamál, skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Stk. 4. Sambært kap. II, §17, stk. 2 skal útstykking og bygging í C3 øki gerast sambært serstakari byggisamtykt fyri ein natúrliga avmarkaðan part av økinum.

Stk. 5. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §2. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið, sum byggisamtyktin regulerar, skal nýtast til íbúðir og felags hentleikar hjá íbúgvunum.

Stk. 2. Útstykkingin hevur íbúðarbygging, felagshús, fríøki, felags parkeringspláss, felags parkeringskjallara og felags reinsiverk.

Stk. 3. Vegir, felagsøkir og gøtur skulu gerast, sum sýnt er á viðhefta kortskjali 2.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Skipanin av parkeringskjallaranum skal vera, sum sýnt er á viðhefta kortskjali 3.

## §5. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggistigið má í mesta lagi verða 0,4.

Stk. 2. Nýtslustigið má í mesta lagi verða 0,8.

Stk. 3. Parkeringskjallari verður ikki taldur við í nýtslustignum.

Stk. 4. Mest loyvda hædd av bygningi er 14,0 m frá planering.

Stk. 5. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt á Argjaboða | | | | |
| **Undirheiti** | Kort 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1.500 | | | | |
| **Dagur** | 02.04.2025 | **Journal** | 25/02905 | **Teknað** | RSB |




## Tórshavnar Kommuna
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða | | | | |
| **Undirheiti** | 2 | | | | |
| **Mát** | 1:750 | | | | |
| **Dagur** | 23.04.2025 | **Journal** | 25/02905 | **Tekna** | |




## Tórshavnar Kommuna

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Argjaboða | | | | |
| **Undirheiti** | 3 | | | | |
| **Mát** | 1:500 | | | | |
| **Dagur** | 23.04.2025 | **Journal** | 25/02905 | **Tekna** | |